## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷5 og ÷2 stig, um náttina niður í ÷7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum ÷5 og ÷8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig, um náttina niður í ÷ 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul upp í ein strúk av eystri og yvirhøvur turt. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin veksur hann vindin av landsynningi og sum fráliður avfall, møguliga fyrst sum kavi, seinna regn. Hitin omanfyri frostmarkið.

# Macbeth á trimum málum í senn

**Ein sermerkt sjónleikarframførsla er undir umbúna á Gamla Meiarínum. Undir leiðslu av litaviskum leikstjóra hittast sjónleikarar úr fýra norðurlondum í hølunum hjá Grímu at seta upp leik.**

Tað er lítið at ivast í, at hetta verður ein av teimum mest sermerktu sýningunum á føroyskum palli í nógv ár. Leikurin er ongin minni enn stórverkið hjá Shakespeare, Macbeth, sum verður framførdur av bert seks leikarum úr Føroyum, Noregi, Svøríki og Finnlandi, og á Norskum, Svenskum og Føroyskum - samstundis. Og afturat tí kemur baltiskt myndamál! . Úrslitið verður ein leikframførsla borðin av svørtum skemti og einum groteskum veruleika: Í eini verð, har valdsgerðir og yvirgangur eru gerandiskostur vaksa fram tey ræðuligastu fólkini.

Teir seks leikararnir hava saman við leikstjóranum og pallmyndaranum leita seg fram til ein hátt at siga søguna um Macbeth við fáum fólkum, og so skilligt sum gjørligt. Hetta er ikki ein háfloygdur leikur um veruleikafjarar kongar og teirra stríð, men ein søga um vanlig fólk, bergtikin av maktgirnd.



*Frá venjingunum av MacBeth uppsetingini hjá Grímu*

Tann traditionella, gamaldags Shakespeare-uppsetingin verður løgd til viks til frama fyri eini leitan eftir, hvat tað er sum fær menniskja at góðtaka valdsgerðir. Teksturin hjá Shakespeare hevur sjálvdan verið meira aktuellur enn í dag, nú heimurin knógvar undir góðkendum og staðfestum yvirgangi, og fremsta endamál hjá maktini er at rættvísgerða sínar valdsgerðir.



*Leikararnir í Grímu, sum skulu spæla serliga leikin*

### Norðurlendskt samstarv

Leikverkið er úrslitið av einum áralongum norðurlendskum samstarvi. Teir fýra sjónleikararnir Anders Kippersund úr Noregi, Anders Öhrström úr Svøríki, Jonte Ramsten úr Finnlandi og Hans Tórgarð úr Føroyum hittust á sjónleikaraskúlanum í Helsinki, og avgjørdu at halda fram við tí góða samstarvinum eftir lokna útbúgving. Afturat sær fingu teir Dick Idman úr Finnlandi og Katarinu Nolsøe úr Føroyum, og leikstjóran Cezaris og pallmyndaran Vytautas Narbutas úr Litava. Fyri ljósinum stendur Clas Hilding úr Svøríki.

Gríma samstarvar við Teater Västernorrland í Svøríki og Turnékompaniet í Noregi, um uppsetingina, sum hevur frumsýning á Gamla Meiarínum 15. februar. Tað verður bert eitt avmarkað tal av sýningum her, tí aftaná skal bólkurin á leikferð til Noregs, Svøríkis og Finnlands – í fyrsta umfarið.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷7 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 12 |
| Tromsø | ÷7 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 15 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 961 hPa. í útsynning úr Føroyum fer móti Suður-Noreg og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer eystureftir og høgættin heldur fram á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/01 kl. 06⁰⁰– 22/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,7°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 14,0 mm – mált frá 21/01 kl. 06⁰⁰– 22/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 160,0 mm




### VESTFALLSKYRRINDI

18. jan.: Mánin longst frá jørðini
21. jan.: Fyrra kvarter
28. jan.: Fullmáni
30. jan.: Máninnæstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. jan | 01.52 | 14.12 | 00.52 | 13.12 | 01.07 | 13.27 | 03.52 | 16.12 | 04.52 | 17.12 | 00.07 | 12.27 | 11.27 | 23.48 | 02.07 | 14.27 | 03.07 | 15.27 | 01.37 | 13.57 | 02.52 | 15.12 |
| 24. jan | 02.33 | 14.55 | 01.33 | 13.55 | 01.48 | 14.10 | 04.33 | 16.55 | 05.33 | 17.55 | 00.48 | 13.10 | — | 12.10 | 02.48 | 15.10 | 03.48 | 16.10 | 02.18 | 14.40 | 03.33 | 15.55 |
| 25. jan | 03.18 | 15.43 | 02.18 | 14.43 | 02.33 | 14.58 | 05.18 | 17.43 | 06.18 | 18.43 | 01.33 | 13.58 | 00.33 | 12.58 | 03.33 | 15.58 | 04.33 | 16.58 | 03.03 | 15.28 | 04.18 | 16.43 |
| 26. jan | 04.08 | 16.34 | 03.08 | 15.34 | 03.23 | 15.49 | 06.08 | 18.34 | 07.08 | 19.34 | 02.23 | 14.49 | 01.23 | 13.49 | 04.23 | 16.49 | 05.23 | 17.49 | 03.53 | 16.19 | 05.08 | 17.34 |

5 707265 100036 >